# Starvsfólk til Starvsfólkadeildina á Føroya Tele

"Tá ið eg eygleiði meg sjálvan og mín hugsunarhátt, má eg viðganga, at mínar hugflogsgávur hava havt meira at siga fyri meg enn evnini at nema nýggja vitan"

- Albert Einstein



**Til Starvsfólkadeild okkara søkja vit eftir einum fólki, sum saman við verandi manning skal menna fyritøkuna at taka móti teimum avbjóðingum á starvsfólkaøkinum, sum nútíðar og framtíðar marknaður og menning krevja.**

Starvsfólkadeildin á Føroya Tele telur í løtuni tvey starvsfólk, sum í tøttum samstarvi við lønarbókhaldið og stjórnarskrivstovuna avgreiða øll starvsfólkaviðurskifti á Føroya Tele. Eisini er Starvsfólkadeildin virkin í tilgongdum og verkætlanum ymsa staðni í fyritøkuni.

Starvið er stápsfunktión hjá stjóranum í Móðurfelagnum og er skipað undir leiðaranum á Stjórnardeildini.

**Vit ímynda okkum, at tann, ið verður sett/-ur skal:**

- hava viðkomandi útbúgving, grundaða á leiðslu og tað "at handfara fólki" – sjúkrarøktarfrøðingur, lærari, sosialráðgevi, HD í leiðslu og fyriskipan, cand. merc. í HRM, NLP-coach ella líknandi
- kenna seg væl við at standa framman fyri nógvum fólkum – bæði veruligt og tykisligt
- førur fyri at bera fram ein greiðan boðskap – bæði munnliga og skrivliga
- kunna taka sjálvstøðugar avgerðir og seta tær í verk
- duga væl við fólki

Eisini má viðkomandi vera til reiðar at útbúgva seg í mun til krøv og ynski hjá Føroya Tele.

**Arbeiðið umfatar:**

- hugskotsgeving og coaching, herundir HR-menning av starvsfólki og leiðarum
- umsiting av sáttmálaviðurskiftum
- gerð, umsiting og tulking av innanhýsis politikkum
- handfaring av setanum og uppsagnum
- vanligt skrivstovuarbeiði í samband við starvsfólkaviðurskifti

Setanarviðurskifti og løn verða ásett eftir avtalu.

Neyvari upplýsingar fáast við at venda sær til Djóna Dalsgarð á Starvsfólkadeildini, tel 303030.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi hósdagin 30. november 2006 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er samtak við Móðurfelag, FT Net, FT Samskifti og Televarpinum. Í samtakinum eru 235 starvsfólk við sera fjølbroyttum útbúgvingum og royndum.**
**Á Føroya Tele taka vit ikki dagar ímillum ættarslag, húðarlit, tjóðskap og etniskan uppruna, trúgv ella kynsligan samleika.**

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*




## BEINLEIÐIS VIÐ BILI ÚR TÓRSHAVN TIL NORSKU SKÍÐFJØLLINI

Gloym alt um stress, væl stúvaðar bussar, knarrut børn og taskurok. Pakkið børnini, viðførið og góða lagið í bilin heima í túninum, koyr umborð á Norrönu, njótið túrin umborð og koyrið vælúthvíld í land í Bergen – klár til eina frálíka familiuferiu.

HEMSEDAL:
4 í bili, fyri hvønn úr bert kr. .......................... **2.893,-**

**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil uppihald í 7 nætur á Fanitullen Apartment í Hemsedal og 2 nætur á Incity Apartments í Bergen á út- og heimferðini. Oljuavgjald er íroknað kostnaðin. Avgeiðslugjald á kr. 60,- fyri hvønn ferðandi er ikki íroknað. Tilboðið er galdandi í tíðarskeiðnum 04.01–17.03.2007.

VOSS:
4 í bili, fyri hvønn úr bert kr. .......................... **3.178,-**

**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil uppihald í 9 nætur á Fleischers Apartment í Voss. Oljuavgjald er íroknað kostnaðin. Avgeiðslugjald á kr. 60,- fyri hvønn ferðandi er ikki íroknað. Tilboðið er galdandi í tíðarskeiðnum 04.01–17.03.2007.

**HEMSEDAL:**
Royni t.d. »norsku alpurnar« Hemsedal 5 tímar frá Bergen. Njótið frálíku náttúruna, hugnaligu matstovurnar, kavan og sólina. Hemsedal hevur kavagaranti og ein av bestu skíðdeplunum í Europa.

**VOSS**
Einans 2 tímar frá Bergen við skíðbreytum fyri børn og vaksin. Kavagaranti, góðar liftir, hugnaligar matstovur og aktivitetir fyri stór og smá. Serlig tilboð til børn eru eisini á staðnum

J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO